


**Nr. 25** *4. desember 2022* **82. árg.**

# Kraftmikla bønin „Faðirvár“

Tað mundi vera einaferð í 70-árunum, at ein norsk bók kom út, sum kallaðist „Når sløret revner“. Hetta er lívssøgan hjá einari ungari gentu í Pakistan, sum var lammað og sat í rullistóli. Pápin hevði verið bæði í Mekka og í Onglandi við dóttrini, men eingin fekk hjálpt teimum. Ein tanta røktaði gentuna. Tey vóru muslimar og ómetaliga rík. Tantan fekk eina enska lærarinnu at læra gentuna enska málið.

Einaferð sigur tantan við gentuna, at tá ið tú lesur í Koranini um Jesus, so sært tú, at hann er hin einasti profeturin, sum kann grøða og vekja fólk upp frá deyðum.

Gentan fór tá at biðja til Jesus. Tá ið tvey ár vóru farin, kom Jesus inn á kamarið hjá gentuni. „Eg eri Jesus. Tú hevur ákallað meg,“ segði hann. Gentan var í grønum náttkjóla, men Jesus lýsti so blankur, at náttkjólin tyktist vera hvítur. „Reis teg upp,“ segði Jesus. „Eg kann ikki ganga,“ svaraði gentan.

„Reis teg upp,“ tók Jesus uppaftur við myndugleika. Tá fór gentan á føtur og var púra frísk. Hon fekk gjørt alt, men eitt lítið brek var enn við vinstru hond. „Hygg, vinstra hond, hon er ikki heilt í lagi enn,“ segði gentan.

Tá smíltist Jesus og segði: „Tú skalt vera mítt vitni.“ So at siga, at tú mást hava hatta brekið at vísa fram, so at fólk kunnu trúgva tær, tá ið tú sigur teimum, at tú hevur verið lammað. Jesus fór nú undir at læra gentuna bønina „Faðirvár“.

Tvær ferðir kom Jesus at vitja hesa gentu, til hon hevði lært seg alla bønina. Aðru ferð, tá ið Jesus var á vitjan, fór hann yvir til vindeygað og segði: „Kom yvir higar, so skal eg vísa tær eitt.“ Hann peikaði út gjøgnum vindeygað, og tá sá gentan eina sjón. Hon sá fleiri fólk. „Hasin maðurin, sum hevur ein krans

um høvdið, skal geva tær eina Bíbliu. Hann er at hitta tætt við, har hin enska lærarinna býr. Men tú skalt lesa í Koranini, til tú fært eina Bíbliu, tí í Koranini stendur eisini skrivað um meg," segði Jesus.

Stór veitsla varð hildin í hesum ríkmannaheimi, av tí at gentan var vorðin frísk. „Tú mást minnast til, at vit eru muslimar og hava Allah. Jesus er gudurin hjá onglendingum og amerikumonnum," ávaraði tantan hana.

Gentan fór so til trúboðarastøðina. Heima segði hon, at hon fór at vitja ta ensku lærarinnuna. Teir flestu trúboðararnir vóru rýmdir av landinum. Men ein var eftir. Hann sat úti í túninum og hevði fleiri Bíbliur undir liðini á sær. Gentan kendi hann beinanvegin aftur. Hetta var maðurin í sjónini. Gentan segði so frá tí, hon hevði upplivað, og spurdi, um hon kundi fáa eina Bíbliu.

„Eg skal fara inn fyrst og biðja yvir hesum," svaraði hann aftur.

Hann kom so út aftur og segði, at Jesus hevði sagt, at hon skuldi fáa eina Bíbliu. „Men eitt skalt tú vita," legði hann afturat, „tú fert at verða forfylgd og kemur at líða nógv, av tí at tú ert eitt Jesus-vitni í hesum muslimska landi."

Og tað gjørdist veruleiki, tá ið hon segði heima, at nú var hon vorðin kristin. Beiggjarnir fóru illa við henni, og síðani varð hon blakað út. Hon sat eisini eina tíð í fongsli; men hon kom at virka sum trúboðari í egna landi sínum.

Ein gomul, trúgvandi kona her í Føroyum segði mær einaferð frá, hvussu sterk Jesu egna bøn „Faðirvár" er.

„Vit skuldu flyta til eina bygd og taka upp eitt arbeiði fyri Jesus har. Frásagnir gingu um, at tað skuldi spøkja so illa. Sjálv haldi eg, at tað vóru andsmaktir, sum gjørdu um seg. Maður mín var burturstaddur í nakrar dagar, so eg var einsamøll við børnunum. Mitt á nátt var eitt ræðuligt buldur, sum skuldi alt brotnað, og tað var beint uttan fyri kamarshurðina. Tað virkaði sum ein 100-punds mjølsekkur datt av ovastalofti og niður. Tá ljóðaði Jesu rødd: „Far ikki upp, men bið „Faðirvár" hart". Tað gjørdi konan, og gangurin bráðsteðgaði. „So títt og knapt høvdið kom niður á koddan aftur, sovnaði eg. Vit vóru ongantíð aftur órógvað. Tað er ikki løgið, at tað er nakað serligt við bønini „Faðirvár". Tað var jú Jesus sjálvur, sum lærdi okkum hana. Guds egni sonur hevur evnað hana til og sett hana saman, og hon fevnir um øll lívsins viðurskifti, tí er ein serlig kraft og styrki í henni," endaði konan.

*Effie Campbell.*

# Sí!

*„Eg kunngeri* ***tykkum*** *eini stór gleðiboð,*
*sum skulu verða* ***fyri alt fólkið!“*** *Luk. 2,10.*

Hvat mundu vit svarað, um vit fingu vitjan av einum eingli frá Himmalsins Gudi?

Hvat **hava** vit svarað upp á boðskapin hjá einglinum?

**Hugsa tær**! Vit – tú og eg – av Guds náði – hava fingið hesa stóru gleði boðaða.

**Men** vit hava ábyrgd fyri tí, sum er litið okkum til.

Boðskapurin er fyri **alt fólkið**!

**Hina náttina** á Betlehems fløtum mátti Gud senda ein eingil við boðskapinum, av tí at tað ikki enn vóru nøkur menniskju, sum vistu um hetta.

Men nú veitst tú tað. Og eg veit tað.

**Jesus** segði: Farið út – og noyði tey – at hús mítt má verða fult. Vit mugu nokk biðja Harran geva okkum eitt hirðasinnalag, sum er villigt. Tað var ikki ringt hjá einglinum at fáa **hirðarnar** at flyta seg yvir til fjósið, til Frelsaran. Menniskju við einum hirðasinnalagi, og sum hava fingið eyguni upp fyri lombunum, børnunum, í dagsins Føroyum, mugu eisini søkja Frelsaran, tí tey gerast var við, at – sum Jesus sigur tað í Jóh. 15,5: „Uttan meg kunnu tit als einki gera.“ Kennir tú nútíðar barnið? – Hevur tú sæð, at tað treingir til ein **hirða**? – Barnið treingir til **Jesus**, men hvør skal vísa tí vegin? Foreldrini, ja, men gera tey tað? Skúlin, ja, men ger hann tað? Vit mugu nokk sanna, at um ikki vit – tú og eg – gera tað, tá fáa tey ikki tann boðskapin at hoyra, sum ljóðaði hina fyrstu jólanátt.

**Hví eru vit málleys?**

Latið okkum hyggja at Lukas 1,11–20, har tað er Sakarias, sum fær einglavitjan, og eini gleðiboð verða honum boðað. Sakarias loyvir sær her at siga: „Av hvørjum skal eg vita hetta **vist**?“ Og Gabriel svarar honum: „Eg eri **Gabriel, sum standi fyri andliti Guds**, og eg eri sendur út at tala til **tín** og at bera **tær** hesi gleðiboðini. (v.19). Sakarias var ein Guds tænari, men møtti Guds gleðiboðskapi við vantrúgv – og **vantrúgv ger okkum málleys**!

Pætur og Jóhannes søgdu: „Vit kunnu ikki annað enn tala um tað, sum vit hava sæð og hoyrt.“ Áps. 4,20.

**Kanst tú**?

*Effie Campbell* umsetti.

# Hann hevur høvdingadømið

Nú jólini nærkast, vilja vit heilsa tykkum øllum við orðunum frá Jes. 9,6: „Tí at barn er okkum føtt, sonur okkum givin, og á herðum hans skal høvdingadømið hvíla.“

Vit takka Gudi, av tí at sonur hansara varð føddur, doyði fyri okkum, og harvið gav okkum frelsuna, sum vit minnast hvørt ár á Jesu føðingardegi. Men tey orðini „á herðum hans skal høvdingadømið hvíla“, eru vorðin ógvuliga livandi fyri okkum nú í seinastuni. Sum tað er undurfult, í hesum ófriðarliga heimi, at vit vita, at Hann hevur ræðið (høvdingadømið) á øllum. Nú, tá ið jólini nærkast, og vit øll tuska runt at náa alt tað, vit skulu, har alt tað materialistiska, stúranir og jólastrongd eru um at vinna á okkum øllum, tá mugu vit steðga á og hvíla í tí, at Hann hevur høvdingadømið á herðum sínum, og takka so inniliga fyri tað.

*„Kirkeklokken“. – E. Campbell* umsetti.

# Orð

Hvat er tað, sum ger, at Harrin opinberar seg fyri summum og ikki fyri øðrum? Hvat við øllum, sum ganga óvitandi gjøgnum lívið uttan so mikið sum at hugsa um, at Gud er til? Ella øll tey kristnu, eg møti, sum ongantíð hoyra frá Gudi ella skilja skriftirnar? Svarið finna vit í Jeremia 29,13–14: „Spyrja tit eftir mær, skulu tit finna meg; og leita tit eftir mær av heilum huga, skal eg lata tykkum finna meg.“ ***Les eisini*** Orðt. 8,17: „Eg elski teir, ið elska meg; og teir, ið leita eftir mær, skulu finna meg.“

*e.c.* ums.

---

Jesus kom í heimin at fyrigeva okkum syndir okkara.

*e.c.*ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 4. des. | **Tekstur:** | 2. Mós. 7,14-11,10 + 12,7-14 | **Bíbliuorð:** | Sl. 3,9 |
| 11. des. | **Tekstur:** | Matt. 1,18-24 | **Bíbliuorð:** | Matt. 1,20 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 26** ***18. desember 2022*** **82. árg.**

# Ein møtiferð beint undan jólum

Í Heimamissiónssøguni, sum Christian Høj hevur skrivað, stendur ein hugtakandi frásøgn. Men hesa frásøgnina havi eg kortini umsett eftir norska blaðnum „Tro & Fakta“.

Tað nærkast jólum. Jacob Eidesgård úr Oyndarfirði og vinur hansara Eiðis Tummas skuldu til Sandoyar at boða evangeliið. Fyrst gingu teir hin langa vegin upp um fjøll úr Oyndarfirði til Selatraðar á Eysturoynni. Haðani vórðu teir fluttir tann drúgva teinin til Hvítanesar á Streymoynni við árabáti. Tað leið móti nátt, tá ið teir kundu fara í land har. Men enn var langt eftir at ganga fyri at koma til Havnar. Millum annað máttu teir fara tvørtur um eitt øki, har eingin vegur var, men kavi og glerstoyttar rásir. Og júst her var tað, at óhappið hendi: Jacob gleið á ísinum, datt og varð liggjandi ...

Teir gjørdust skjótt greiðir yvir, at beinið var brotið. Teir vóru á einum oyðistaði á myrkari nátt, og langt var til næstu bygd. Haraftrat fór at kava. Støðan tyktist vónleys og ræðandi. Hvat var at gera?

Tað einasta, sum teir kundu gera, var at ganga ta leiðina, sum báðir so inniliga væl kendu: bønarvegin. Men nú ráddi ikki um innantómt tos. Tað vistu báðir. Nú var tørvurin ítøkiligur. Teimum tørvaði hjálp frá einum livandi og veruligum Frelsara. Henda náttartíman í kavarokinum boygdi Eiðis Tummas knø undir liðini á hjálparleysa vinmanni sínum og fór at biðja. So fór hann á føtur og beyð honum: „Í Jesu navni, statt upp og gakk!“

Mundi nakað henda? Jú, sanniliga! Jacob fór straks á føtur, og beint aftaná hildu teir fram ferð síni móti Havnini. Gud í

himlinum hevði staðfest ta einfaldu trúnna og játtingina hjá tænarum sínum. Grøðingarundrið var veruleiki.

Tá ið Jacob og Eiðis Tummas langt út á náttina komu til Havnar, fóru teir oman á Sjómansheimið at gista restina av náttini. Men tá ið teir komu hagar, er alt sjálvandi læst og sløkt. Hvat var nú at gera? Um teir bankaðu á úthurðina á náttartíð, vaktu teir hinar gestirnar. Tað var heldur ikki hugnaligt at rópa ella á annan hátt royna at vekja nakran. Hesir báðir Harrans tænararnir høvdu gingið langt – í tænastu hjá hinum Hægsta – og nú trongdu teir so sáran at hvíla seg eitt sindur.

Teir ganga bara beint móti úthurðini, trýsta klinkuna varisliga niður – og hygg: hurðin var opin! Teir fara stillisliga inn og finna fyristøðumannin, Harald á Sjómansheiminum, á kamari sínum uppi á 2. hædd. Hann vaknar og spyr mest sum eitt sindur skelkaður, hvussu teir vóru komnir inn. Hann hevði nevniliga sjálvur læst dyrnar um kvøldið! Teir máttu tá bara svara honum, sum satt var, at hurðin var opin fyri teimum, tá ið teir komu.

Fyristøðumaðurin fer at ivast og kvikar sær niður til úthurðina, men hann gerst enn meira bilsin, tá ið hann sær, at hon er væl og virðiliga læst!

Tað er eingin menniskjanslig frágreiðing um tað, sum var hent. Men Guds børn frøa seg! Tí at tann Harri og Meistari, sum førdi Pætur út úr fangahúsinum og læt tey stóru fangahúsportrini upp – hann er framvegis hin sami fyri tænarar sínar, fyri tey, ið líta á hann, í anda og sannleika. Hans er æran – aleina!

*Effie Campbell* umsetti.

## Handa spurningin hevði eg ikki væntað

Lívið hevur ikki verið heilt tað sama síðani hin sunnudagin, tá ið eg kom heim úr kirkju, og kona mín spurdi: „Baðst tú fyri mær í kirkjuni í dag?“

Eg gjørdist eitt sindur ørkymlaður og ikki lítið skammfuktaður. Eg noyddist at siga, sum satt var, at tað hevði eg ikki hugsað um.

„Íðan, hví gongur tú so í kirkju meðni?“ spurdi hon. „Eg biði altíð fyri tær, tá ið eg eri har.“

Tað var ikki ein feril av brigsli í rødd hennara, bara mild undran. Hon hevði ligið sjúk alla vikuna, men tá ið vikan var

farin at halla, var hon so mikið frægari, at vit vóru ikki bangin longur. Tá ið sunnudagurin kom, settist eg í mínum sessi í kirkjuni – og so, tá ið eg kom til hús, var tað, at hon spurdi: „Baðst tú fyri mær?“

Í tí løtuni var mær greitt, at alt var um at gerast vani. Eg fylgdi við í sangi og skriftlestri og dugdi alt uttanat.

Kanska er tað ein slíkan spurning, onkur okkara treingir til – frá hjúnafelaga okkara, frá einum vini ella frá heiminum uttan um okkum: „Baðst tú fyri mær?“

*„Kirkeklokken“ – Effie Campbell* umsetti.



# Hvat kærleiki kann

Í einum fangarúmi í einum býi í Skåne sat ein vandamikil fangi fyri nøkrum árum síðani. Hann var harður og treiskur. Hvørki vinarlig ella álvarslig orð høvdu nakra ávirkan á hann, og hann vildi ikki, at prestur skuldi vitja seg.

Ein dagin varð hurðin til fangarúmið gloppað, og ein fangavørður gav fanganum eina vakra, hvíta kalu (ein urtapott), sum júst var farin at blóma.

„Eg skal geva tær hesa,“ segði hann, „við heilsan frá einum, sum enn elskar teg, hóast alt.“

Hurðin varð læst aftur, og tímarnir gingu sum fyrr.

Kvøldið kom. Fangavørðurin hugdi inn í fangarúmið gjøgnum hin lítla gluggan í hurðini. Har sat fangin og hugdi alla tíðina at tí hvítu blómuni, meðan hendur hansara kíndu henni, sum var hon eitt elskuligt barn.

Dagin eftir kom fangavørðurin aftur inn í fangarúmið. Nú lá ein undarlig ljósglæma um tey fyrr so hørðu andlitsbrøgdini á fanganum. Hann helt saman hendur, sum royndi hann at biðja. Eyguni vóru blindað av tárum. Og frá tí degi var hann mildari. – Kærleikin er hin sterkasta maktin.

*Effie Campbell* umsetti.



# Jesu føðing

Nógvir megnarmenn hava gjøgnum tíðirnar virkað til stórt gagn fyri mannaættina, men eingin kann kortini á nakran hátt sammetast við Jesus, Guds son, sum fór frá allari dýrd Himmalsins fyri á krossinum at taka okkara syndir á seg.

Við trúgv á hann kann ein og hvør gerast førur fyri at liva til Guds æru her á jørð og aftaná fáa atgongd til Himmalin.

Tá ið Jesus var føddur, hendi nógv stórt og undurfult, og tílíkt hevur eingin sæð hvørki fyrr ella seinni. Seyðamenninir úti á Betlehems fløtum upplivdu, at ein Harrans eingil boðaði teimum, at nú var Frelsarin føddur, og at teir kundu finna hann inni í Betlehem í einari krubbu.

„Og í somu stund var hjá einglinum ein fjøld av himmalskum herskarum, sum lovaðu Gudi.“ Luk. 2,13. Tá ið einglarnir vóru farnir aftur til Himmals, skundaðu seyðamenninir sær inn til Betlehem, har teir funnu „Mariu og Jósef og barnið liggjandi í krubbuni.“ Luk. 2,16.

Tá ið seyðamenninir høvdu sagt alt tað, sum var sagt teimum um hetta barnið, vendu teir aftur og „lovaðu og prísaðu Gudi fyri alt tað, sum teir høvdu hoyrt og sæð.“ (v. 20)

At Jesus varð føddur í einum fjósi, fær okkum at hugsa um, hvat rúm vit geva honum í lívi okkara? Hann, sum er Himmalsins kongasonur, eigur at hava fremsta plássið í hjarta okkara og lívi.

*Effie Campbell* umsetti.

# Vísdómsorð



*Jólini eru:*
**tíðarinnar** vendipunkt,
**kærleikans** hæddarpunkt,
**Frelsarans** byrjanarpunkt
og **tilbiðjanar miðpunkt.**

„Hvør er hann, hesin dýrdar kongur? Harri herskaranna. Hann er tað, ið er dýrdar kongur. Sela.“ Sálmur 24,10.

*Effie Campbell* umsetti.



## Sunnudagsblaðið

*ynskir øllum eini gleðilig jól*
*og Harrans signing í komandi ári*



## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 18. des. | **Tekstur:** | Luk. 2,1-20 | **Bíbliuorð:** | Luk. 2,11 |
| 25. des. | **Tekstur:** | Matt. 2,1-12 | **Bíbliuorð:** | Sl. 119,130a |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74